DAGSINS MEINING

Við ábyrgd – ella ábyrgdarloysi

Fyri nøkrum fáum árum síðani var tað utopi, men flestu føroyingar taka í dag undir við, at Føroyar miðja ímóti at byggja upp ein sjálvberandi búskap. Tað merkir, at vit skulu klára okkum búskaparliga uttan heildarveitingina úr danska ríkiskassanum.

Summi vilja hava ein sjálvberandi búskap, tí tað er ein partur í politisku stevnuni at skipa fullveldi, ella loysa. Onnur, tí tað er ein partur í sjálvstýrispolitiki, einum sjálvbjargingarpolitikki, uttan at tey kortini ynskja at loysa úr ríkisfelagsskapinum.

Tá tað ikki eydnaðist landsstýrinum at gera semju við danir um fullveldi við langari skiftistíð, hevur landsstýrið avgjørt at skerja blokkstuðulin 3-400 milliónir krónur frá næsta ári. Restina, einar 6-700 milliónir, skal heimastýrið átaka sær eftir 4-5 árum.

Hetta er óðamannaverk, heldur Javnaðarflokkurin, sum hevur latið búskaparfrøðing greina ætlan landsstýrisins. Niðurstøðan er, at Føroyum fara at vanta einar 6 milliardir í tøkum peningi um eini 12 ár. Farvæl vælferðarsamfelag, er niðurstøðan.

Javnaðarflokkurin letur í sínum útrokningum búskaparvøksturin vera tað sama sum í ES-londunum, ið er eitt sindur lægri enn landsstýrið roknar við. Útreiðsluvøksturin er hinvegin settur eitt sindur hægri enn landsstýriv hevur sett í sínar útrokningar.

Flokkurin er fyri at lækka heildarveitingina, men mælir til at fara hóvligari til verka, og skerja blokkin 100 milliónir næsta ár. Síðani skal danski stuðulin minka í samsvari við tann búskaparvøkstur, sum er í landinum.

Men fullveldisfólk halda, at útrokningar Javnaðarfloksins eru dapurskygdar. Tey vilja hava fullveldi, líka mikið hvørjar avleiðingarnar verða. Javnaðarflokkurin vil hinvegin ikki taka skorar undan vælferðarsamfelagnum, sum landsstýrið ger.

Her standa vit í dag - fullveldispolitikkurin hjá landsstýrinum móti sjálvstýrissinnaða politikkinum hjá Javnaðarflokkinum - eitt lítið ár undan løgtingsvalinum. Nógv tjóðskaparkensla er uppií, og hon skuggar ofta fyri búskaparliga veruleikanum.

Sjálvstýri - ella økt sjálvstýri - skulu vit hava. Spurningurin er bara, um vit skulu stýra tjóðskaparkensluni við skili, fara hóvliga fram, við ábyrgd móti tí einstaka borgaranum, ella um vit loypa av stað í blindum, og sektin á vælferð fólksins!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Javnaðarflokkurin vil senda oljupengar til Danmarkar

Høgni Hoydal

Á tíðindafundi boðar Javnaðarflokkurin frá, at føroyingar kunnu aldri klára seg uttan danskar pengar. Á sama fundi boðar flokkurin frá, at um føroyingar fara at klára seg væl og skapa størri inntøkur – tildømis av oljuvinnu - so skulu vit senda pengar til Danmarkar.

Sama dag sigur Jóannes Eidesgaard við Fregnir, at tað minnir um nýmótans imperialismu, at danir keypa sær vald í Føroyum við pengum.

Kann onkur ikki greiða frá, hvat í allari víðu verð gongur fyri seg?

Ein meiningsleysur maður, mitt í eini meining, hvat meinar hann?

Hesi orðini hjá skaldinum Kára P. runnu fram fyri meg fríggjadagin. Ein og sama dag sigur javnaðarflokkurin:

1. At tað líkist nýmótans imperialismu tá danska stjórnin tilvitað hevur keypt sær vald í Føroyum.
2. At føroyingar fara aldri at klára seg uttan danskar pengar.
3. At um føroyingar fara at klára seg væl og fáa størri intøkur, so skulu vit senda pengar til Danmarkar.

Gjald fyri vald?

Tað vil altso siga: At javnaðarflokkurin nú viðurkennir, at danska stjórnin tilvitað hevur roynt at skapa ein studningsbúskap í Føroyum. Har javnaðarflokkurin skuldi fáa danskar pengar til sosialar skipanir, meðan fólkaflokkurin skuldi fáa pengar til vinnulívsstudning. Altso júst tað, sum rendi Føroyar á heysin í 90'unum.

Um føroyingar so fáa størri inntøkur, tildømis av oljuvinnu, so skulu vit afturfyri, at danska stjórnin hevur keypt sær vald gjøgnum eitt nú javnaðarflokkin, geva teimum inntøkur av ognini hjá Føroya fólki.

Hvat verður tað næsta? Skulu vit eisini gjalda pengar til Danmarkar afturfyri, at danska stjórnin hevur selt okkum til Nato?

Onki hongur saman

Men her er so nógv, sum ikki hongur saman: Javnaðarflokkurin roynir at seta føroyingar inn í eitt rokniark, sum onkur búskaparfrøðingur skal hava gjørt. Men hvør tað er, er ein hemmligheit. Hví nú tað? Skulu vit nú trúgva uppá huldufólk?

Javnaðarflokkurin sigur, at sjálvt um vit klára okkum væl búskaparliga, so skulu vit framvegis verða undir donskum valdi og ábyrgd – og gjalda afturfyri.

Javnaðarflokkurin biður okkum velja millum fólkapensión og loysing. Men í 80'unum, tá vit brúktu eina milliard meira av donskum og útlendskum pengum, hendi ongin betring í fólkapensiónini. Men meðan vit hava lagt lunnar undir ein fullveldisbúskap, er fólkapensiónin betrað munandi og alt almanna, heilsu- og skúlaverkið betrað munandi. Og vinnulívsstudningurin er strikaður.

Frá sjálvstýristosi til "krystallnátt"

Er hetta sami flokkur, sum fór til val uppá eina íslendska loysn í tjóðskaparspurninginum? Er hetta sami flokkur, ið segði sig vilja yvirtaka alt og gjalda fyri tað? Men sum nú, tá vit hava 600 mió. í yvirskoti, ikki vil yvirtaka skúlamál fyri 300 mió. - og kallar tað "eina krystallnátt"? Er hetta sami flokkur, sum fyri fáum vikum síðani kallaði tað eina "krystallnátt" at skerja blokkin, og nú kortini vil skerja hann við 100 milliónum? Er tað so ein triðings "krystallnátt"?

Er ongin álvari yvirhøvur í nøkrum – og kemur ein nýggjur boðskapur ímorgin?

Kom til arbeiðis

Um javnaðarflokkurin heldur fram á henda hátt, so óttist eg storliga fyri, at hann ætlar at koyra Føroyar á heysin einaferð afturat og at binda okkum fastari í danska ríkið, enn vit nakrantíð hava droymt um.

Tí ein innilig áheitan á javnaðarflokkin: Kom og tosa um ein politikk fyri Føroyar. Har vit sjálvi vilja skapa eitt samhaldsfast samfelag, grundað á eitt sterkt vinnulív, ið kann bera vælferðini. Lat okkum ikki aftur selja okkum til eina danska stjórn. So er tað líka gott bara at lata dansku stjórnina stýra beinleiðis og opinlýst – og ikki gjøgnum føroyskar flokkar, har vit spæla fólk í húsi, men taka onga ábyrgd.

Finnið nú útav, hvat tit vilja, og komið til arbeiðis.

Sosialurin skerdur í síðutali

PRENTÚTBYGGING
Blaðstjórnin

Hesa vikuna og helst alla næstu viku verða prentmaskinurnar á Prentmiðstøðini, sum Dimmalætting og Sosialurin eiga í felag, útbygdar. Hetta merkir, at Sosialurin hetta tíðarskeiðið ikki kann prentast í fleiri enn 32 síðum, eins og at litsíðurnar verða skerdar.

Av hesi orsøk er tað trupult hjá okkum at fáa alt tilfarið við til tíðina, og tí kann henda, at tilfari kemur at liggja niðurfyri. Vit vilja í hesum sambandi heita á fólk, ið vilja hava innsent tilfar við í blaðið, um at skriva stutt og greitt. Best er um vit fáa tilfarið teldutókt, annahvørt sum teldupost ella á diskli. Men til ber eisini at senda okkum brævi ella faks. (Adressur og faksnummar síggjast í kolofonini niðanfyri).

Tá prentsmiðjan er liðugt útbygd, verður prentgóðskan munandi betri, fleiri síður kunnu prentast í liti – og síðutalið kann økjast.

Vónandi bera lesarar og lýsarar yvir við avmarkingunum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

VIÐMERKINGAR

Fullveldi og hugsjónir

Lisbeth L. Petersen,
Sambandsflokkur

Soleiðis sum tosað verður í dag millum fullveldisfólk, so er ongin onnur hugsjón til enn fullveldishugsjónin. Hon er hin einasta rætta í hesi verð. Tann føroyingur, sum ikki er fullveldissinnaður, hevur onga hugsjón. Basta !!

Og nú er formaður Tjóðveldisfloksins farin undir eina roynd at afturvísa øðrum meiningum við heimagjørdum søgum um, hvussu sambandsfólk gleðast, tá tað gongur illa í hesum landi. Sambandsvongurin vil Føroyum og føroyingum onki gott, men hitt øvugta.

Orsøkin til søgurnar er helst tann, at myndin við meginpartinum av danska blokkinum inni á bók (tí her ber væl til at liva uttan blokk, alt gongur jú so væl), hongur ikki saman við myndini um illviljaðar danir, sum vilja taka blokkin burtur um 4 ár, og tí má finnast uppá nakað annað. Kanónirnar verða nú vendar móti sambandsvonginum, sum onki skilir, men bert hugsar um peningaflytingar, kontoavrit, rokniark og peningaoyðsl !

Tað, sum nívir landsstýrismannin er, at búskaparfrøðingar og roknskaparkøn fólk hava gjørt nakrar útrokningar fyri Sambandsflokkin, sum afturvísa tí, sum Høgni Hoydal annars hevur ført fram um framtíðarvánir Føroya. Tilfarið, sum hesi fólkini hava brúkt at rokna eftir, er m.a. úr Hvítubók og øðrum útrokningum og talvum, sum eru útflýggjað uttanlandsnevndini og nú almenn. Hesar nýggju útrokningar koma sjálvandi ikki fullveldisætlanunum so væl við, og tí er ágangur á Sambandsflokkin.

Men sambandshugsjónin er greið. Vit vilja liva í hesum landi, og her skal vera gott at vera fyri øll. Vit eru stolt fólk, og vit skulu greiða og gjalda tað sjálvi, sum vit orka at gjalda, men vit vilja ikki ofra vælferðina. Tey virði vit hava, skulu vit umsita væl. Møguleikarnir vit hava her í Norðuratlantshavi, skulu vit brúka skilagott. Vit kvetta ikki vinabond ella samstarvsbond bert fyri at prógva, at vit eru røsk, ella fyri at vísa umheiminum, at vit eru so einastandandi røsk og ófør.

Vit spæla ikki við framtíð føroyinga, og vit sleppa ikki teim rættindum vit hava.

Annars er at siga til greinina Tá ringt er gott – og gott er ringt, sum landsstýrismaðurin vendir móti Sambandsflokkinum, at yvirskriftini kann eg taka undir við, tí eg leggi júst tað øvugta í hana og vendi henni aftur til Høgna, av tí at hon hóskar best til hansara egnu politisku hugsjón.

Hví stjelur SL arbeiðspláss úr Vágum?

Marjus Dam
løgtingsmaður

Fyri fáum árum síðani, koyrdu 5 ferðafólkabussar frá Vágum. Hóast ferðafólkatalið er nógv vaksið um flogvøllin, varð talið skert til 3 bussar. Um stutta tíð missir oyggin helst ein buss afturat, so bert tveir bussar verða eftir. Orsøkin er central skriviborðsstýring og savning!

Ikki er ringt at gita, hvar niðurløgdu arbeiðsplássini blóma upp. Um hendan skaðiliga gongd heldur fram, verður skjótt ongin ferðafólkabussur eftir í Vágum. Tað er kanska eisini ætlanin. Hóast tað er ríkiligt av ferðafólki at flyta!

Spurningur til B Djurholm:

Tað er neyðugt at gera vart við hesi viðurskiftir. Farið tí, nú tingið er í summarfrí, at spyrja Landstýrismannin í Vinnumálum, hví hann ikki steðgar hesi púra skeivu gongd. Tað kann ikki vera rætt, at slíkur stuldur av arbeiðsplássum fer fram frá Vágum. Tað munar sera lítið, at leggja fram álit um økismenning og útoyggjar (teori), ímeðan arbeiðspláss í praksis samstundis verða stolin úr útjaðaraøki.

Fyri nøkrum árum síðani vóru 5 bussar her vesturi. Tað gav arbeiði til millum 5 og 10 fólk. Nú flogferðslan er nógv økt hevði verið meira rímiligt, at teir 5 ferðafólkabussarnir vóru blivnir til 7 ella 8. Men skjótt verða bert 2 bussar eftir í oynni, tí "ein ella annar" hevur funnið tað fyri gott at takað hesi arbeiðspláss av oynni og flyta arbeiðsplássini annað stað.

Eg og fleiri við mær krevja eitt svar frá landsstýrismanninum í Vinnumálum, hví hendan fyri Vágoynna skeiva gongd heldur fram?. Hevði tað ikki verið rættast, at allur ferðafólkaflutningur í smb við flogvøllin hevði høvuðsstað í Vágum?. Verður hendan skeiva gongd eisini framd aðrar staðir í landinum?

Hvør er orsøkin til at hendan "flyting" av arbeiðsplássum verður framd?. Hvør er tað í tekur avgerð í hesum viðurskiftum? Er tað landsstýrismaðurin? Ella er tað embætismaður?Ella onkur annar?

Gongdin má steðgast og broytast

Eitt er púra greitt:
Øll busskoyring í smb við flogvøllin og ferðafólkaflyting eigur framyvir at hava høvuðsstað í Vágum!
Tað er onki minni enn eitt rímiligt krav!

Royndin hjá Fíggjarmálastýrinum at brúka fútarættin sum amboð miseydnaðist

TÍÐINDASKRIV
Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið

Fútarætturin hevur seinnapartin avgjørt at vísa frá sær áheitanini hjá Fíggjarmálastýrinum um at seta feløgum okkara bann móti at nokta limum okkar at sigla við Teistanum.

Samstundis hevur fútarætturin nokta at eftirlíka einari líknaði áheitan frá Strandfaraskipum Landsins.

Vit høvdu væntað, at fútarætturin ikki fór at lata seg misbrúka í hesum lógliga stríði okkara, og tí kemur avgerðin ikki óvart á okkum.

Kann verandi samgonga liva við einum leiðara fyri Lønardeildini, sum leggur slík mál fyri fútarættin?

Sum vit skilja, so er tað leiðarin á Lønardeildini saman við advokatinum hjá deildini, sum eru upphavsmenn til hugskotið at royna at fáa fútarættin at steðga feløgum okkara í lógliga fakliga stríði okkara.

Hetta stig er so langt úti, at vit undrast á, at verandi samgonga og ikki minst fíggjarmálaráðharri okkara kann liva við at hava ein slíkan leiðara sitandi á Lønardeildini.

Ikki minst er hetta hugvekjandi, tá hetta í veruleikanum er ein roynd at føra inn á føroyska arbeiðsmarknaðin eina rættarskipan, sum hvørki hevur undirtøku hjá fakfeløgunum ella politiska meirilutanum á tingi.

Ein sigur fyri føroyska arbeiðararørsluna

Avgerðin hjá fútarættinum at vísa afturat royndunum hjá Fíggjarmálastýrinum at føra inn á føroyska arbeiðsmarknaðin eina skipan, sum samanberast kann við danska Arbeiðsrættin er ein sigur, ikki bert fyri feløg okkara, men eisini fyri føroysku arbeiðararørsluna sum heild.

Eitt skal Fíggjarmálastýrið gera sær geitt, og tað er, at slík álop á grundlógartryggjaða rætt okkara at nokta limum okkara at taka arbeiði á einum øki har eingin sáttmáli er galdandi, fara fakfeløgini ongantíð at lata sær lynda.

Ætlar eingin at gjalda fyri fullveldið ?

Jóhan Petur Johannesen

Meirilutin á Føroya Løgtingi hevur samtykt eina "koyriætlan", sum hevur við sær, at blokkstuðulin úr Danmark verður skerdur við 300 – 400 mió. krónum longu komandi ár.

Men sambært somu løgtingssamtykt, er hetta bara fyrsta stigið á leiðini, tí samgongumeirilutin ætlar, at allur blokkstuðulin skal burtur um stutta tíð, og harumframt skal føroyska samfelagið (skattgjaldarin) átaka sær fleiri kostnaðarmiklar skyldur, sum danska ríki higartil hevur havt.

Áhugaverdi spurningurin er nú, hvussu vit fáa hetta at hanga saman fíggjarliga.

Eingin vil spara

Teir sokallaðu "tungu postarnir" á fíggjarlógini eru almannamál, heilsumál og skúlamál. Hesi kostað á verandi fíggjarlóg meira enn 2 milliardir krónur tilsamans.

Men formaðurin í Sjálvsstýrisflokkinum hevur longu sagt á tingsins røðarapalli, at játtanin til almanna- og heilsumálini má ikki skerjast, sjálvt um blokkstuðulin minkar.

Nýggi landsstýrismaðurin bakkar heldur ikki ein tumma

Í hesi vikuni kemur nýggjur landsstýrismaður at umsita skúlamál. Í fyrstu samrøðuni, sum hann hevði við Útvarp Føroya, eftir at hann var valdur, segði hann, at peningurin sum er tillutaður fólkaskúlanum er ikki nøktandi, og at tað er týdningarmikið at skúlin fær tann neyðuga peningin, fyri at kunna útfylla rammurnar í fólkaskúlalógini.

Hetta fekk útvarpsmannin at spyrja, hvussu lætt tað fór at verða at fremja hesa ætlan, tá raksturin av skúlamálum skuldi yvirtakast, samstundis sum blokkstuðulin skuldi minka við kanska 400 mió. krónum.

Til hetta svaraði hann soleiðis: "Nei eg haldi ikki, at mann skal blanda tey tingini saman. Eg haldi tað, at vit verða noydd at síggja fólkaskúlan sum eina berandi kraft í samfelagnum, og tað er neyðugt at geva fólkaskúlanum tær neyðugu rammurnar at liva undir, og í hesum førinum eisini tann neyðuga peningin".

Hetta kann ikki skiljast ørvísi enn at nýggi landsstýrismaðurin heldur ikki ætlar at skerja-, men at økja útreiðslurnar.

Tá Óli Holm tosar um neyðugan pening til fólkaskúlan, hvat so við nýggjum lærarum og pedagogum? Vit kunnu jú ikki hava skúlar og lærarar, uttan at vit eisini útbúgva fólk.

Eta burturav yvirskotinum

Um einki verður spart í almanna-, heilsu- og skúlamálum, er ringt at fáa eyga á, hvar nakrar munagóðar sparingar kunnu verða gjørdar. Landsstýrið noyðist tí at "eta burturav yvirskotinum" á fíggjarlógini, heldur enn at spara. Tað merkir so aftur, at tað verða komandi politikarar, sum skulu gera allar tær illa lýddu sparingarnar sum skulu til, um blokkstuðulin skal burtur.

Vit kunnu tí staðfesta,

- At vit hava eitt landsstýri, sum vil áleggja framtíðar politikarum at gera yvirtøkur, hóast teir einki hava yvirtikið sjálvir.
- At vit hava eitt landsstýri, sum vil áleggja framtíðar politikarum at spara, hóast teir einki hava spart sjálvir.
- At vit hava eitt landsstýrið, sum vil avtaka blokkstuðulin, hóast blokkstuðulin bara er vaksin, meðan teir sjálvir hava sitið.

Og so kunnu hesir um nøkur ár skriva í søgubøkurnar, at teir royndu at gera Føroyar til tað, teir kalla "frælsa tjóð", við at fyrireika bæði yvirtøkur og minking av blokkstuðlinum.

– Hini kunnu so taka tær illa dámdu avgerðirnar.